# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Maskinmeistarar í 1959 - 50 ára minni






*Myndaeigari: Eilev Lindberg*

Hesir fingu prógv á Føroya Maskinmeistaraskúla í 1959.

**Aftara rað f.v.:** Thorstein Mýlinstind, Miðvágur, Jakku Durhuus, Vestmanna, Annfinn Joensen, Hvalvík, Robert Mohr Poulsen, Tórshavn, Pauli Knudsen, Tórshavn, Eli Thomsen, Sumba, Johannes Jul Askham, Tórshavn, Helgi Hansen, Miðvágur, Einar Joensen, Sumba, Eli Davidsen, Strendur, Christian Jacobsen, Skála, Petur Jakku Højsted, Funningur, og Torbjørn Hentze, Argir.

**Fremra rað f.v.:** Holgar Lið, Mykines, Signheðin Jensen, Norðragøta, Eilev Lindberg, Tvøroyri, Høgni Joensen, Tórshavn, Oskar Joensen, Mykines, Sofus Johansen, Strendur, og Jógvan Nónsgjógv, Gjógv.

**Lærarar f.v.:** Petur Christiansen (maskin og el) Dánjal á Dul (støddfrøði) Frants Jacobsen (fysik og kemi) Tórarin Evensen (føroyskt og danskt)

# Nólsoyingur dømdi Stein Bagger

Tá Stein Bagger, fyrrverandi stjóri í IT Factory fríggjadagin varð dømur sjey ára fongsul, var tað hálvi nólsoyingurin, Søren Holm Seerup, ið var dómari.

Søren Holm Seerup, dómari, er sonur Fridu, dóttir Jógvan og Valborg Joensen í Heiðriksstovu í Nólsoy. Hon giftist til Danmarkar við Lars Seerup.

Søren Holm Seerup er dómari við rættin í Lyngby, og hann hevur fyrr starvast sum advokatur, til hann varð útnevndur dómari í Lyngby fyri einum ári síðani.



*Søren Holm Seerup, dómari í Lyngby, lesur upp dómin fyri Stein Bagger*

*Mynd: DR*

**Dagurin**
**15. juni. Valdimarsdagur.** Danski kongurin Valdemar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi 1219. Navnið Valdemar er eftir russiska Vladimir, ið merkir mikil í sínum valdi.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Birgar Johannessen:

# Ársins borgari 2009

Lions Club Tórshavn hevur aftur í ár kosið »Ársins borgara«, og hesa ferð fall heiðurin Birgari Johannessen í lut fyri hansara slóðbrótandi og áhugaverda arbeiði

Seinnu árini hevur verið fastur siður, at Lions Club Tórshavn heiðrar eitt ella fleiri fólk við heitinum »Ársins borgari«, tí tey hava gjørt eitt arbeiði ella lagt eftir seg avrik, ið onkursvegna skarar framúr.

Í ár er hesin heiður fallin havnarmanninum, Birgari Johannessen, í lut, tí hann í fleiri ár hevur lagt eitt stórt arbeiði í at savna saman tilfar um Havnina. Fyrst fór hetta við allari frítíðini, men seinnu árini hevur tað meira ella minni verið hansara fulltíðarstarv.

Teir, sum hava mannað undirnevndina í Lions Club Tórshavn, sum tekur sær av at velja »Ársins borgara«, eru Ólavur Jákup Kristoffersen, Heini Olsen og Niels Nattestad, og teir siga millum annað soleiðis í grundgevingini fyri, at Birgar Johannesen í ár fær heiðurin:



*Niels Nattestad handar her vegna Lions Club Tórshavn havnarmanninum, Birgari Johannessen, eitt innrammað heiðursskjal, ið staðfestir, at Birgar er »Ársins borgari 2009«*

»Higartil eru komnar tvær bøkur frá hansara hond, har ið hann lýsir høvuðsstaðin frá 1900 til 1969 til stóra gleði fyri bæði tey, sum eru fødd og uppvaksin í býnum, men somuleiðis laðar hann við bókum sínum landsins størsta býi ein minnisvarða til komandi ættarlið.«

Birgar Johannessen fekk á hugnaligari samkomu herfyri handað eitt heiðursskjal, sum prógv fyri, at hann er »Ársins borgari 2009«, og hann kvitteraði við at greiða frá ymsum áhugaverdum um Havnina gjøgnum árini, sum hann vísti við myndum frá ymsum tíðarskeiðum.